


# Bókstaviligt og á heimligum

**VIKUSKIFTI** HEVUR VITJAÐ TRÍGGJAR STÓRAR **RÁÐSTEVNUR** Í STOCKHOLM. **HEM 2010**, **HEM&VILLA** OG BARNARÁÐSTEVNUNA **UNDERBARABARN**. HESAR TRÍGGJAR **RÁÐSTEVNUR** ERU VÆLVITJAÐAR AV BÆÐI **HANDLUM** OG **VANLIGUM** FÓLKI, IÐ ERU FORVITIN EFTUR TÍ **NÝGGJA** INNAN HEIM OG **INNRÆTTING**.

Tvey rák, ið ikki slapst undan á nakrari av teimum trimum messunum, vóru tað umhvørvisvinarliga og tað við bókstøvum. Bókstavar, sum pynt úr jarnið, betong og gipsið. Sitat at klistra á veggin og inrammaði orðatøk. Ja, bókstavar vóru bókstaviliga allastaðni á stevnunum. Umhvørvið merktist nógv í tilfarinum, ið møblarnir og tingini eru gjørd úr. Nógv verður tosa um eyndurnýtslu, og maturin til tey minstu skal sjálvandi verða vistfrøðiligur. Tilsamans væntaðu fyrireikarirnir at eini 40.000 fólk vitjaðu ráðstevnurnar. Vikuskifti hevði myndatólið við, og tók myndir av tí nýggjasta, besta og stuttligasta.










## Vøkur seyðaskinn

Seyðaskinn hava vit nógv av í bæði í Svøríki og Føroyum. Hendan fyritøkan hevur gjørt stólar og krakkar, sum tey síðani hava klætt við seyðaskinnið í ymiskum mynstrum. Les meira á www.yllebruk.se







## Betongvakurt

Ger tínar egnu vasar og ljósastakar úr betongi. Lætt og vakurt

## A,B,C-rákið

Og her eru bókstavar í langum banum. Bæði sum sitat at hanga á veggin, klistra á veggin ella seta í vindeygakarmin. Bleytir bókstavar til børnini vóru eisini at finna

## Pakka inn við toyi





Furoshiki House vil fáa okkum at gevast at pakka okkara gávur inn í pappír, sum vit síðani blaka vekk. Furoshiki, er aldargamal siður úr Japan, har pakkað verður inn við einum fýrakantaðum toystykki, ið síðani kann eyndurnýtast frá persóni til persón. Les meira á www.furoshikihouse.se





**Lampa sum fær tey flestu at hyggja uppeftir**